# Ársfrásøgn

fyri tíðina 01.01.13 - 31.12.13












ALS

WWW.ALS.FO

# Upplýsingar um skipanina

**Arbeiðsloysisskipanin**
Tinghúsvegur 14
FO 100 Tórshavn
Telefon: 359550
Telefax: 359551
Heimasíða: www.als.fo
Roknskaparár: 01.01- 31.12

**GRANNSKOÐAN**
JANUAR
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

**STÝRIÐ**
Eyðfinnur Jacobsen, stýrisformaður
Georg Hansen
Herálvur Joensen
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Snorri Fjallsbak

**STJÓRN**
Magni á Deild Olsen, stjóri





# Innihaldsyvirlit


Upplýsingar um skipanina v.m. . . . . . . . . . . 2

Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4

Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . 5

Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6-7

Frágreiðing frá leiðslu . . . . . . . . . . . . . . . . . 8-25

Rakstrarroknskapur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26

Fíggjarstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27

Pengastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . 28

Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . . . . . . . 29-30

Notur til ársfrásøgnina . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri Arbeiðsloysisskipanina fyri roknskaparárið 01.01.13 - 31.12.13.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett verið neyðugar, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá skipanini. Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin á ein rættvísandi hátt lýsir tey viðurskifti, sum frágreiðingin fevnir um.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfund, og mælt verður til at góðkenna hana.

*Tórshavn, tann 23. mai 2014*

**Stjórn**

**Magni á Deild Olsen**
stjóri

**Stýrið**

**Eyðfinnur Jacobsen**
stýrisformaður

**Magnus Pauli Glerfoss** | **Marita Rasmussen** | **Óluva í Gong**

**Snorri Fjallsbak** | **Georg Hansen** | **Herálvur Joensen**

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**TIL LEIÐSLUNA Í ARBEIÐSLOYSISSKIPANINI**

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri roknskaparárið 01.01.13-31.12.13, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymi og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og lógini um ALS.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlógini. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31.12.13 og av úrslitinum av virksemi, peningastreymi hjá Arbeiðsloysisskipanini í roknskaparárinum 01.01.13 - 31.12.13 samsvarandi ársroknskaparlógini og lóg um ALS.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava sum ásett í ársroknskaparlógini lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

*Tórshavn, tann 23. mai 2014*

JANUAR
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

**Jørmann Petersen**
Statsaut. revisor

# Høvuðstøl

| Upphædd í tkr. | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | | | | | |
| Inntøkur | 183.489 | 180.540 | 141.946 | 140.450 | 137.290 |
| Indeks | 134 | 132 | 103 | 102 | 100 |
| Útgjøld og útreiðslur, arbeiðsleys | -196.357 | -244.285 | -308.430 | -259.544 | -157.271 |
| Indeks | 125 | 155 | 196 | 165 | 100 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskriving | -35.555 | -84.496 | -184.833 | -138.447 | -33.078 |
| Indeks | 107 | 255 | 559 | 419 | 100 |
| Fíggjarligir postar, netto | 11.775 | 15.039 | 2.275 | 32.226 | 53.988 |
| Indeks | 22 | 28 | 4 | 60 | 100 |
| Ársúrslit | -28.520 | -77.096 | -189.320 | -112.157 | 17.770 |
| Indeks | -160 | -434 | -1.065 | -631 | 100 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Aktiv tilsamans | 317.328 | 345.483 | 435.133 | 614.963 | 727.223 |
| Indeks | 44 | 48 | 60 | 85 | 100 |
| Eginogn | 306.881 | 335.402 | 412.498 | 601.817 | 713.974 |
| Indeks | 43 | 47 | 58 | 84 | 100 |
| **Pengastreymar** | | | | | |
| Nettopengastreymar frá: | | | | | |
| Rakstri | -25.793 | -87.252 | -175.126 | -115.431 | 26.978 |
| Íløgum | 0 | -2.532 | -5.525 | -9.516 | -1.170 |
| Pengastreymar í árinum | -25.793 | -89.784 | -180.651 | -124.946 | 93.340 |

# Lyklatøl

| | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentabilitetur** | | | | | |
| Renting av eginogn | - | - | - | 0,0% | 3,2% |
| **Soliditetur** | | | | | |
| Eginognarpartur | 96,7% | 97,1% | 94,8% | 97,9% | 98,2% |
| **Annað** | | | | | |
| Ársverk í miðal | 32 | 29 | 25 | 21 | 17 |

Renting av eginogn $$\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$$

Eginognarpartur $$\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

**LYKLATØL**

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá “Den Danske Finansanalytikerforenening”.
Lyklatøl við negativum virði eru ikki tikin við.



# Frágreiðing frá leiðslu

## Ársfrágreiðing

Árið 2013 gjørdist eitt gott og hendingaríkt ár hjá ALS. Minkandi arbeiðsloysi gjørdi, at farna árið fíggjarliga royndist munandi betur enn undanfarin ár. ALS hevði eitt hall á 28,5 mió. krónur, men samanborið við 2012, tá hallið var omanfyri 77 mió. krónur, so er talan kortini um munandi framgongd.

Virksemið var nógv og fjølbroytt. Stórur dentur var – og verður framvegis – lagdur á at fáa fólk aftur til arbeiðis, og vit eru sannførd um, at ALS kann og eigur at hava ein virknan leiklut í at knýta bond millum føroyskar arbeiðsgevarar og tey fólkini, sum eru í skipanini, og sum brennandi ynskja sær eitt arbeiði.

ALS hevur brotið upp úr nýggjum í 2013. Nógvar øðrvísi verkætlanir hava verið royndar við góðum úrslitum, og tað hevur givið áræði at halda fram við nýggjum, spennandi átøkum.

## Minkandi arbeiðsloysi

Verður hugt at gongdini í arbeiðsloysinum síðani Arbeiðsloysisskipanin varð sett á stovn í 1992, so tala tølini fyri seg. Eftir at arbeiðsloysið var í hæddini í stóru kreppuni í 1993 og 1994, tá tað var omanfyri 17%, so er tað minkað javnt og samt síðani, og á sumri í 2008 var so at siga einki arbeiðsloysi í Føroyum. Tað árið fingu í miðal niðanfyri 300 fólk arbeiðsloysisstuðul frá ALS, og okkurt tíðarskeið var talið niðri á bert hálvtannaðhundrað.

Alheims búskaparkreppan, sum tók seg upp í 2008, og serliga gjørdi vart við seg her í Føroyum í seinnu hálvu tað árið, hevði við sær, at arbeiðsloysið fór at vaksa, og tá Føroya Fiskavirking í desember 2010 fór av knóranum, vaks arbeiðsloysið við út við 50% eftir nøkrum fáum døgum.

Tá fór arbeiðsloysið upp um 8%, men síðani er arbeiðsloysið minkað aftur, og er nú komið niður ímóti 4%.

## Gongdin í 2013

Fyrstu níggju mánaðirnar í 2013 minkaði arbeiðsloysið í Føroyum við 1,3 prosentstigum úr 5% niður í 3,7%, men vaks so nakað aftur seinasta ársfjórðingin. Við árslok í 2013 var arbeiðsloysið 4,3%, sum kann sigast at vera rættiliga lágt.

**Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld – ársmiðal**




**Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld – 2013**



Eitt arbeiðsloysi á 4,3% svarar til, at sløk 1.000 fólk fáa útgjald frá ALS. Umframt eru tey, sum fáa forsorg frá Almannaverkinum vegna arbeiðsloysi. Við árslok vóru tey 281 í tali.

## Nógv gerast arbeiðsleys

Talið av fólki, sum í styttri ella longri tíðarskeið koma inn í Arbeiðsloysisskipanina, er rættiliga høgt. Í 2013 vórðu soleiðis 2.072 arbeiðsloysi stovnað, meðan 2.200 arbeiðsloysi vórðu strikað.

Nakrir persónar eru, sum eru komnir inn í skipanina fleiri ferðir í 2013, og hyggja vit at talinum av einstaklingum, so vórðu 1.833 ymisk fólk skrásett at fáa arbeiðsloysisstuðul í 2013, meðan 1.989 fólk fóru úr skipanini aftur.

Við stívliga 23.000 løntakarum í Føroyum, so svarar tað til, at eini 8% av løntakarunum gjørdust arbeiðsleysir í fjør. Glottin er, at tað vóru enn fleiri, sum aftur fingu arbeiði.

Hesi seinastu seks árini síðani 2008 eru omanfyri 14.000 arbeiðsloysi stovnaði í skipanini hjá ALS.

Verður hædd tikin fyri, at summi gjørdust arbeiðsleys fleiri ferðir hesi árini, so vóru tað omanfyri 8.000 persónar – áleið ein triðingur av øllum løntakarum, sum komu framvið hjá ALS hesi árini.



**Talið av stovnaðum og strikaðum arbeiðsloysum árini 2008 til 2013**



## Arbeiðsloysið í Føroyum er lágt

Verður arbeiðsloysið í Føroyum samanborið við arbeiðsloysið í londunum í ES og Noregi, so er greitt, at arbeiðsloysið í Føroyum við árslok í fjør var lægri enn í nøkrum landi í ES, og tað var bert í Noregi, at arbeiðsloysið var lægri enn í Føroyum.

## Heldur fleiri løntakarar

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst í ávísan mun aftur í talinum av løntakarum, sum er vaksið sama tíðarskeið, sum arbeiðsloysið er minkað, og sum síðani er minkað aftur, tá arbeiðsloysið vaks nakað í síðsta ársfjórðingi í 2013.

Hóast eitt ávíst samsveiggj er millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum, so er samanhangurin valla heilt greiður, tí greiningar hjá ALS vísa, at fleiri av teimum fólkunum, sum eru farin úr ALS-skipanini í 2013, eru farin av arbeiðsmarknaðinum í eitt styttri ella longri tíðarskeið. Fleiri eru farin av landinum, og fleiri er farin frá við eftirløn. Onnur eru farin í barnsburðarfarloyvi, meðan aftur onnur eru farin úr Arbeiðsloysisskipanini, tí tey hava brúkt allar dagarnar í skipanini og nú fáa forsorg frá Almannastovuni vegna arbeiðsloysi.

Hinvegin eru eyðsæð onnur flutt heim úr útlondum at gerast partur av arbeiðsfjøldini í Føroyum.

## Lønargjaldingarnar standa í stað

Eisini í lønargjaldingunum síggjast í fyrstu atløgu tekin um framgongd – hóast kanska avmarkað. Síðani aldarskiftið hevur ein støðugur vøkstur verið í samlaðu útgoldnu lønunum, úr 4,7 mia. krónum í ár 2000 upp í 7,2 mia. krónur í farna ári. Í 2013 er talan um ein vøkstur á stívliga 100 mió. krónur í mun til árið fyri. Tað svarar til ein avmarkaðan vøkstur á 1,5%.

**Arbeiðsloysið í mun til onnur lond**





**Tal av løntakarum í 2013**




**Løngjaldingar árini 2000 - 2013**





Tá lønargjaldingarnar verða reinsaðar fyri vøksturin í brúkaraprístalinum, hava lønargjaldingarnar sambært Búskaparráðnum kortini staðið mestsum í stað síðani 2004. So hóast gongdin í lønargjaldingunum við fyrsta eygnabrá ber boð um framgongd, so er veruleikan sannlíkt heldur tann, at tað hevur verið lítil og ongin vøkstur í búskapinum hesi árini.

Hóast tað ikki enn sæst aftur í lønargjaldingunum, so eru kortini tekin um vaksandi virksemi.

Nógvar stórar byggiverkætlanir eru í gongd. Verkætlanir, sum geva arbeiði til fleiri hendur meðan bygt verður, og sum eisini fara at geva arbeiði til fleiri fólk, aftaná at byggingin er liðug, og vinnuvirksemið er farið í gongd.

Í Fuglafirði verður nýtt virki bygt at taka ímóti uppisjóvarfiski. Fleiri fólk eru í arbeiði at byggja virkið, og sambært feskastu útmeldingunum verður tørvur á eini 50 fólkum, tá virksemið av álvara fer í gongd.

Á Tvøroyri eru nógv nýggj arbeiðspláss hjá Varðin Pelagic, og eisini haðani ljóðar, at virkið møguliga verður bygt út, og at virksemið fer at vaksa.

Á flogvøllinum hava nógvar hendur verið i arbeiði. Fyrst at leingja vøllin og nú at gera nýggja farstøð, sum skal verða liðug í juni/juli 2014.

Byggingin av Skúladeplinum í Marknagili er av álvara byrjað, og eisini har eru nógv fólk til arbeiðis, og Bank Nordik er eisini farin undir at byggja nýtt høvuðssæti í Havn.

Tað er so nógv ferð á byggivinnuni, at tað stendur á hjá byggifyritøkunum at fáa nóg nógva skikkaða arbeiðsmegi, sum tí mugu uttanlands at leita eftir fólki.

Samstundis sum føroysku byggifyritøkurnar mangla fólk, so leita alt fleiri føroyskir handverkarar sær uttanlands at arbeiða. Serliga er tað Noreg, sum dregur við nógvum virksemi og høgum lønum. Tað ger avbjóðingina hjá føroyskum handverkarafyritøkum at fáa fólk við neyðugum førleikum verri, og landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur tí tikið stig til lógarbroytingar, so at tað verður lættari hjá útlendskari arbeiðsmegi innan ávísar vinnur at koma til Føroyar at arbeiða.

Eisini í alivinnuni gongur væl. Útflutta nøgdin táttaði í 59 tús. tons, og var ein hin størsta yvirhøvur. Eisini prísirnir á laksi vóru høgir í 2013, og samlaða útflutningsvirðið var 2,5 mia. krónur, sum er tað mesta nakrantíð. Hetta hevur við sær, at rakstrarúrslitini aftur í 2013 vóru góð. Føroyska alivinnan er yvirhøvur væl fyri, og úrslitið hjá størsta alisamtakinum í Føroyum, Bakkafrost, var omanfyri 700 mió. krónur í 2013.

Talið av løntakarum innan ali- og kryvjivirki hækkaði við sløkum 10% og táttaði í 900 fólk við árslok í 2013.

Hóast glottar, so gongur framvegis einki serligt hjá tí partinum av høvuðsvinnuni, sum roynir eftir botnfiski við Føroyar. Í mun til árið frammanundan minkaði avreidda nøgdin við 7% í 2013, men samlaða virðið vaks tó við tveimum prosentum upp í slakar 158 mió. krónur.

Hóast lítlan vøkstur í veiðivirðinum í mun til 2012, so eru nøgdirnar nú niðanfyri tað, tær vóru ræðsluárini í 1993-1994.

Hóast tað ikki er eins stór framgongd í øllum vinnum, so eru kortini tekin um glottar, og at tað gongur framá í fleiri vinnugreinum. Hetta sæst, sum nevnt, eisini aftur í arbeiðsloysinum, sum er eitt tað lægsta í næstan fimm ár.

## Fólk eru longri arbeiðsleys

Hóast ein vaksandi eftirspurning eftir skikkaðari arbeiðsmegi, so hava tey sløku túsund fólkini, sum eru arbeiðsleys í løtuni – t.e. í mai mánaði í 2014 – í miðal einki arbeiði havt í 280 dagar. Tað er í meiri enn níggju mánaðir.

Hetta eru fólk, sum eru í skipanini, og sum tí einki arbeiði hava. Verður hugt eftir, hvussu leingi tey fólkini, sum hava verið í skipanini, men sum síðani eru farin úr henni aftur seinastu seks árini, hava verið í skipanini, so er longdin av arbeiðsloysunum væl lægri.

Í 2009, tá fólk vóru stytst arbeiðsleys, vóru tey í skipanini í í miðal 115 dagar. Síðani eru fólk vorðin longri arbeiðsleys, og tey fólkini, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 250 dagar.

Júst hvør orsøkin er til, at fólk nú eru longri arbeiðsleys enn fyri fimm árum síðani, er ikki greitt.

Tað er tó greitt, at spjaðingin er stór. Av teimum, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu fleiri steðgað í bara ein, tveir ella tríggjar dagar, meðan tann, sum hevði fingið arbeiðsloysistuðul longst, kom



**Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys**




**Tal av fólkum, sum eru dottin út vegna fult dagatal**



í skipanina fyrst í februar mánaði í 2009 og fór úr henni aftur í september mánaði í 2013. Tá hevði viðkomandi verið í skipanini í 1.700 kalendaradagar.

## Fleiri detta út

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysisskipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt trý ára skeið, men sum dømið omanfyri vísir, so ber undir serligum umstøðum til at steðga longri.

Orsøkirnar kunnu vera fleiri. Ein er, um ein persónur hevur verið í starvsvenjing ella havt okkurt smávegis arbeiði samstundis, sum viðkomandi hevur fingið arbeiðsloysisstuðul.

Tá fólk hava verið hesar 648 dagarnar í skipanini í eitt trý ára skeið, so fella tey fyri dagatalinum og detta úr skipanini.

Myndin á fyrru síðu vísir, at í árunum 2008 til 2010 vóru tað á leið 20-30 fólk, sum fóru úr skipanini av hesi orsøk, men í 2011 vaks talið munandi, og seinastu trý árini eru millum 110 og 140 fólk árliga farin úr skipanini, tí tey hava brúkt allar dagarnar.

Ein orsøk til stóra vøksturin er sannlíkt hon, at talið av arbeiðstøkum í skipanini er vaksið stútt síðani 2008, og tí eru eyðsæð fleiri við tíðini fallin fyri dagatalinum.

## Størsta avbjóðingin

Sum nevnt, so er arbeiðsloysið í Føroyum lágt bæði sæð úr einum søguligum sjónarhorni, og eisini um samanborið verður við arbeiðsloysið í londum, vit vanliga samanbera okkum við.

Hóast lága arbeiðsloysið, so hevði Arbeiðsloysisskipanin eitt hall á omanfyri 28,5 mió. krónur í 2013 – í eini tíð, tá skipanin helst skuldi verið styrkt fíggjarliga.

Hetta ber boð um, at skipanin ikki er skrúvað rætt saman, og at tørvur er á at gera neyðugar tillagingar, so skipanini eisini í árunum, sum koma, verður lív lagað.

Stýrið fyri ALS er tí farið undir eina tilgongd at greina, hvørjar broytingar skilabest er at gera fyri at tillaga skipanina, so hon hongur betur saman fíggjarliga.

Enn er ov tíðliga at siga, hvørjar ítøkiligar broytingar talan verður um, men hetta arbeiðið verður væntandi liðugt, tá komið verður út á heystið í 2014, og møguligar broytingar fara sannlíkt at fáa virkna frá árskiftinum 2014/2015.

## Skaðiligt at vera arbeiðsleysur

At hava eitt arbeiði er av alstórum týdningi fyri okkum øll, og avleiðingarnar av arbeiðsloysi eru álvarsligar, og tað er eingin ivi um, at tað er skaðiligt fyri fólk at ganga fyri einki í longri tíð.

Fyri tann einstaka hevur arbeiðið avgerandi týdning fyri samleikan, sjálvsvirðingina og fyri sosialan status. Arbeiðsloysi ávirkar sjálvsfatanina hjá okkum, og vandi er fyri skuldarkenslum og skomm og fyri, at man kemur í eina persónliga kreppu.

Til tess at byrgja upp fyri neiligu avleiðingunum av arbeiðsloysinum, eigur ALS tí at virka fyri, at fólk ikki eru ov leingi arbeiðsleys, og at tey ikki ganga fyri einki ov leingi.

Tí eigur ALS at taka stig til, at fólk, ið verða rakt av arbeiðsloysi, fáa møguleikan at koma at vera saman við øðrum. At knýta sambond og vera virkin og at sleppa at avrika og skapa virðir. Helst í vanligum arbeiði – í arbeiðsfelagsskapum – men ber tað ikki til, so undir arbeiðslíknandi umstøðum, sum ALS eigur at skipa fyri.

Tað er eisini umráðandi at taka atlit til, at tey arbeiðstøku kunnu lívbjarga sær og hava eina inntøku, sum tryggjar teimum rímilig kor. Tað er valla ætlanin, at arbeiðsloysisstuðulin skal tryggja fólki eitt serliga høgt livistøði, men hinvegin má arbeiðsloysisstuðulin vera á einum støði, so fólk kunnu kenna seg rímiliga fíggjarliga trygg eitt tíðarskeið, meðan tey einki arbeiði hava.

Tað er eisini umráðandi, at upphæddin er á einum støði, so arbeiðsloysisstuðulin ikki verður orsøk til, at fólk leita sær av landinum heldur enn at vera her.

Tí vil ALS framhaldandi tryggja arbeiðstøkum eina rímiliga inntøku, og ALS fer eisini at halda fram at skipa umhvørvi, har fólk fáa høvið at avrika saman við øðrum. Vakstrarhúsið í Sandavági er eitt dømi um slíkt umhvørvi, sum er meiri varandi. Onnur dømir eru ymsar verkætlanir, sum ALS tekur stig til, og sum er gott høvi hjá fólki at hittast og skapa sambond. Royndirnar vísa, at tað ofta gongur bara stutt tíð, so eru fleiri av fólkunum, sum taka lut í slíkum verkætlanum, aftur til arbeiðis.

Tí gevur tað meining fyri bæði tey arbeiðstøku og fyri ALS at skipa slík umhvørvi.

### Snýr seg um at fáa fólk í arbeiði

Á Arbeiðsloysisskipanini vilja vit fegin gera mun – og vit vita, at vit kunnu gera mun.

Vit eru sannførd um, at vit kunnu og eiga at hava ein virknan leiklut í at fáa fólk aftur í arbeiði, og royndirnar hjá okkum vísa, at har vit knýta tættari sambond við bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstøk, har hendir okkurt, sum ger, at fólk fara skjótari til arbeiðis aftur.

Arbeiðið at styrkja innsatsin at byggja brúgv millum arbeiðsgevarar, sum hava tørv á fólki, og arbeiðstøk, sum brennandi ynskja sær eitt arbeiði, helt fram í 2013 og fer eisini at halda fram komandi árini.

Við støði í sannføringini um at gera mun er arbeiðsávísingin hjá ALS styrkt, og við eini sterkari, proaktivari ávísing, sum hevur tøtt sambond við arbeiðsgevarar, og einum virknum hópi av kveikjarum, sum kenna førleikarnar, ynskini og dreymarnar hjá teimum arbeiðstøku, fara fyritreytirnar fyri at fáa fólk aftur í arbeiði at verða enn betri.

Ein fyritreyt fyri at fáa fólk aftur í arbeiði er vitan um, hvat fólk, sum eru í skipanini, hava hug at fáast við. Hvørjum tey brenna fyri, og hvat tey duga serliga væl. Tí fóru vit í 2013 undir at fyrireika at hava samrøðu við hvønn einstakan, sum var í skipanini, og fyrstu átta vikurnar av 2014 vóru hesar samrøðurnar hildnar – væl omanfyri túsund í tali.

Annar týðandi partur í tí at fáa fólk aftur til arbeiðis er førleikamenning – bæði sum styttri skeið í ymsum fakligum og eisini sum verkætlanir av ymsum slag.

Í 2013 hevur ALS brotið burtur úr nýggjum á nógvum økjum, og royndir hava verið gjørdar við ymsum virksemi, sum áður neyvan hevði verið hugsingur um at farið undir.

Felags fyri alt virksemið er, at tað skal geva meining – bæði fyri tey, sum luttaka, og eisini fyri ALS.



Tað er ikki ein avgerandi treyt, at verkætlanirnar hanga saman fíggjarliga, men tað er hinvegin eingin vansi, um tær gera tað. Ein onnur avgerandi fyritreyt fyri allar verkætlanirnar er, at tær undir ongum umstøðum mugu vera í kapping við verandi vinnulív.

## Ull er ikki Føroya gull

Í tráð við sannføringina um at eingin skal hava fyri neyðini at ganga fyri einki og fyri at fáa í lag umhvørvi, har fólk kunnu koma saman og avrika og skapa virðir, varð í árinum skipað fyri fleiri ymiskum verkætlanum.

Ein verkætlan, ALS royndi fyri fyrstu ferð, var at taka ímóti føroyskari ull, skilja hana í litir og dygdir og síðani pakka hana í ballur.

Hetta var gjørt fyri at skapa nakað av virksemi, men eisini fyri at fáa hesa rávøruna til høldar, heldur enn at hon verður koyrd í brenniovnarnar ella verður brend úti í haganum.

Verkætlanin helt til í stóru bygningunum hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði, og talan var um samstarv millum fleiri partar. Búnaðarstovan lat hølið, Búnaðargrunnurin stuðlaði verkætlanini við fimm krónum fyri hvørt kilo av ull, og IRF átók sær at flyta innsavnaðu ullina ókeypis til Kollafjarðar. Verkætlanin var eisini eitt samstarv við Almannastovuna, haðani fólk luttóku í arbeiðinum.



Tá avtornaði hevði ALS tikið ímóti sløkum 43 tonsum av ull, sum varð seld fyri stívliga seks krónur kilo. Við stuðlinum frá Búnaðargrunninum bar til at rinda teimum, sum lótu ullina, beint oman fyri seks krónur fyri hvørt kilo. Dygdin á føroysku ullini er ikki altíð góð. Ein norskur serfrøðingar, sum var í Føroyum í sambandi við verkætlanina, metti dygdina vera vánaliga. Tí er marknaðarprísurin á føroysku ullini lágur, og hevði Búnaðargrunnurin ikki stuðlað verkætlanini fíggjarliga, hevði grundarlag valla verið fyri at skipa fyri móttøku av ull.

Út við 20 fólk luttóku í verkætlanini, og Árni og Karin Brattaberg frá Sirri løgdu teimum lag á at skilja og pakka ull, umframt at Karin Brattaberg eisini stóð fyri einum kreativum parti, har luttakararnir lærdu at lita ull úr náttúrulitum og at evna ymiskt til úr ull.



## Eplir

Ein onnur verkætlan, sum varð roynd á fyrsta sinni í 2013, var at seta niður eplir. Aftur her var talan um eitt samstarv við Búnaðarstovuna í Kollafirði.

ALS keypti 3 tons av seteplum, sum vórðu sett niður í seks ymiskar veltur í Suðurstreymoy og í Sandavági.

Eisini tann verkætlanin gekk væl. Hópin av fólki tók lut í at seta eplir niður, og í hesi verkætlanini sást veruliga virðið av tøttum sambandi millum arbeiðstøk og kveikjarar. Tað vísti seg skjótt, at tað lá betri fyri hjá kveikjarunum at hjálpa hesum fólkum, sum tey nú kendu við fornavni, aftur í starv í mun til tey, sum kveikjararnir ikki hava so tætt tilknýti til.

Í august og september mánaði vórðu sløk 10 tons av eplum tikin uppaftur og seld. Nakað varð selt á sølutorginum í Vágsbotni og í gongugøtuni í Havn, og ein partur varð seldur fyritøkum umvegis telefon.

## Vakstrarhúsið

Verkætlanin við Vakstrarhúsinum, sum byrjaði í 2012, helt fram í 2013. Royndirnar vóru góðar og jaligar, og hópin av fólki hevur verið í Vakstrarhúsinum í styttri og longri tíðarskeið.

Endamálið við Vakstrarhúsinum er fleirbýtt. Tað snýr seg fyrst og fremst um at fáa fólk at spíra og at nærkast arbeiðsmarknaðinum aftur, men tað snýr seg eisini um at fáa tað grøna at spíra og at skapa vøkstur – bókstavliga.

Eins og summarið frammanundan vóru tað serliga jarðberini, sum vaktu ans. Tey vóru nógv í tali, og smakkurin var einastandandi. Tað vísti seg eisini, at hóast tey vóru væl dýrari enn útlendsk jarðber, so var eftirspurningurin so stórur, at framleiðslan kundi verið fleirfaldað.

Umframt jarðber vórðu eisini røtur og ymsar kryddurtir dyrkaðar í Vakstrarhúsinum, umframt at royndir vórðu gjørdar við øðrum vøkstri eisini.

Ætlanin er at halda fram við vakstrarhúsinum og virka fyri at menna framleiðsluna av reinum, heilsugóðum føroyskum landbúnaðarvørum, sum kunnu verða partur av einum "føroyskum køki" við dygdargóðum rávørum, sum vekja ans – eisini hjá útlendskum gourmetgestum.

## Timburskeið á Tekniska Skúla

Umframt hesar verkætlanirnar omanfyri, so hevur eisini verið skipað fyri øðrum.

Fyri triðju ferð varð skipað fyri einum 3-mánaða skeiði í handverki og timburlæru á Tekniska Skúla í Havn. Á tí skeiðnum luttóku 14 fólk, sum lótu væl at og fingu nógv burturúr.

Handaliga verkætlanin, sum hesaferð var knýtt at verkætlanini, var at gera eitt fríøki til búfólkini á Eirargarði. Hetta eydnaðist væl, og bæði búfólk og starvsfólk vóru glað um úrslitið, og á ALS fegnast vit um, at vit kunnu taka lut í slíkum samfelagsgagnligum verkætlanum, sum gera mun.

## Talgilda savnið hjá Kringvarpinum

ALS tók eisini stig til at fara undir at talgilda savnið hjá Kringvarpinum í tøttum samstarvi við Kringvarpið og Mentamálaráðið.

Løgtingið hevur játtað Kringvarpinum pening til at byrja verkætlanina, og í juni mánaði 2014 fara fyrstu fólkini til verka í savninum. Byrjað verður at skanna gomul pappírsskjøl, og seinni verður farið undir at talgilda og varðveita útvarps- og sjónvarpsbondini.

Tilfarið er rúgvismikið, og tí fer henda verkætlanin væntandi at halda fram í fleiri ár við skiftandi manning.

### Skelta Føroyar

Samstarv við onnur – serliga við almennar stovnar og kommunur – gongur aftur í nógvum av verkætlanunum hjá ALS, og so var eisini við verkætlanini "Skelta Føroyar".

Henda verkætlanin varð til í einum samstarvi millum Ferðaráð Føroya, Runavíkar Kommunu, Landsverk og ALS.

Verkætlanin snúði seg um at seta skelti upp á ymsum viðkomandi støðum í Runavíkar Kommunu. Á skeltunum ber til at lesa ymiskt um júst hetta staðið, og skeltini eru eitt íkast í at menna ferðavinnuna í Runavíkar Kommunu.

Landsverk gjørdi skeltini, meðan fólk frá ALS tosaðu við heimildarfólk í økinum, skrivaðu niður og tóku myndir og syrgdu fyri, at skeltini komu at standa á røttum stað.

Aftur ein øðrvísi verkætlan, sum gevur meining fyri allar partar, og sum er samfelagsgagnlig.

### Fjølbroytt skeiðsvirksemi

Umframt størru verkætlanirnar omanfyri, so hevur ALS í 2013 skipað fyri einum hópi av ymsum skeiðum. Summi eru fyriskipað innanhýsis, meðan onnur eru keypt frá skeiðsveitarum uttanhýsis.

Í innihaldi eru skeiðini ymisk. Nevnast kunnu bókhaldsskeið, telduskeið, skeið í kunstterapi, søluskeið, skeið í at læra at skriva umsóknir og at skriva CV umframt longri skeið í samstarvi við Kvøldskúlan í Havn, har tað bar til at taka ávísar lærugreinir á 10. floks støði.



Tilsamans hava fleiri hundrað fólk verið á skeiðum, sum ALS hevur skipað fyri.

## Starvsvenjingin

Eitt av amboðunum, sum hevur virkað væl í mun til at fáa fólk aftur til arbeiðis, er starvsvenjingin. Síðani farið var undir hesa skipanina aftur í 2011, hava áleið 600 fólk verið í starvsvenjing, og av hesum eru omanfyri 90% ikki longur í skipanini. Orsøkirnar eru fleiri, men nógv tey flestu eru farin til arbeiðis.

## Betri viðurskifti við Danmark

Í 2013 hava fleiri samráðingarumfør verið um at broyta avtaluna millum Føroyar og Danmark, sum ásetir, hvussu fólk kunnu flyta millum arbeiðsloysisskipanir í báðum londunum.

Nýggja avtalan, sum væntandi kemur í gildi á sumri í 2014, fer at hava við sær, at tað fer at bera til hjá fólki – eitt nú føroyingum – í donskum a-kassum at koma til Føroyar í upp til tríggjar mánaðir at leita sær arbeiði. Við nýggju avtaluni fer tað eisini at bera til hjá føroyingum, sum eru í ALS, at fara til Danmarkar at leita sær arbeiði í upp til tríggjar mánaðir.

Í hesum trimum mánaðunum kunnu fólk varðveita arbeiðsloysisstuðulin úr heimlandinum, meðan tey eru uttanlands og leita sær arbeiði.

Vónirnar eru, at nýggja skipanin fer at gera tað lættari hjá serliga føroyingum í Danmark at koma aftur til Føroyar at finna sær arbeiði og vónandi at búsetast.



## Ársfundurin

Í mai mánaði var ársfundurin hjá ALS hildin í hugnaligu hølunum í Fabrikkini hjá Östrøm, har væl av fólki kom at lýða á og taka lut í prátinum um ALS og um arbeiðsloysi yvirhøvur.

Harvið varð tátturin við ársfundum tikin upp aftur fyri fyrstu ferð síðani miðskeiðis í nítiárunum. Ársfundurin er eitt slag av aðalfundi, har tey, ið dagliga varða av ALS, hava høvið at kunna um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina.

Umframt at starvsfólk hjá ALS løgdu fram og greiddu frá ymiskum viðurskiftum, so legði Heri á Rógvi frá felagnum Lóður fram úrslitini frá eini stórari kanning, tey hava gjørt millum fólk, sum eru ella hava verið arbeiðsleys í seinastuni.

## Spennandi framtíð

Hóast nakað av búskaparligum skýggjum hómast, so er støðan ikki verri enn so, at tað við skilagóðum tillagingum ber til at tryggja ALS eina góða og trygga framtíð.

Og framtíðin sær spennandi út – í øllum førum á tí radaranum, vit hyggja í nú.



Komandi árini verður enn størri dentur lagdur á at førleikamenna fólk og at fáa tey aftur til arbeiðis.

Tað verður gjørt við miðvísum innsatsi at byggja brúgv millum arbeiðsgevarar og arbeiðstøk og við samstørvum við viðkomandi partar. Teir eru almennir stovnar, kommunur og privatar fyritøkur.

Tað er umráðandi, at eingin skal vera noyddur at ganga fyri einki, tí tað er ferð eftir ferð prógvað, at tað er skaðiligt.

Tí skulu vit á ALS áhaldandi skipa fyri tiltøkum, verkætlanum og umhvørvum, har fólk kunnu koma at vera saman við øðrum at styrkja teirra sosialu og fakligu førleikar. Tey skulu hava høvið at vera virkin og skapa virði – bæði fyri seg sjálvan, og eisini fyri føroyska samfelagið.

### Lógarbroytingar:

Ongar lógarbroytingar eru gjørdar í 2013.

### Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrættin at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2013 var samlaða upphæddin 67 tús. krónur.

### Trygdargrunnur fiskivinnunar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar, um at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 1,2 mió. krónur í 2013.

### Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloyistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Í januar 2013 fóru nakrir av stýrislimunum úr stýrinum, og varalimir tóku sæti í stýrinum fyri tey.

Nýtt stýri skuldi eftir upprunaligu ætlanini veljast 1. oktober 2013, og henda dagin tók verandi stýri við.

Eyðfinnur Jacobsen, advokatur, sum tók við sum stýrisformaður í januar 2013, helt fram í nýggja stýrinum, sum tók við 1. oktober 2013.

Ernst Jacobsen fór frá sum stjóri í januar 2013, og Magni á Deild Olsen tók við eftir hann tann 1. mars 2013.



## Inngjøldini hækkað nakað

Til tess at betra um fíggjarligu støðuna hjá Arbeiðsloysisskipanini varð ALS-gjaldið hækkað úr 1,0% upp í 1,25% tann 1. januar 2012.

Úrslitið av hækkanini er, at árligu inngjøldini hjá ALS nú eru á leið 40-45 mió. krónur hægri, enn tey vóru frammanundan hækkanini. Í 2013 vóru samlaðu inngjøldini 183,5 mió. krónur, sum er á leið tríggjar mió. krónur meiri enn í 2012.

Gula strikan í myndini niðanfyri er ALS-gjaldið, meðan stabbarnir eru samlaðu inngjøldini.

## Útgjøldini minka

Eftir at arbeiðsloysið var í hæddini við ársbyrjan í 2011 – beint eftir at Føroya Fiskavirking var farið av knóranum – er arbeiðsloysið støðugt minkað og útgjøldini til arbeiðsloysisstuðul somuleiðis.

Í 2011 vóru samlaðu útgjøldini 308 mió. krónur, og tvey ár seinni vóru samlaðu útgjøldini 196 mió. krónur, sum er nærum 47,9 mió. krónur minni enn undanfarna ár og omanfyri 111 mió. krónur minni enn í 2011.

Samlaðu útgjøldini á 196,4 mió. krónur eru býtt soleiðis:

| Mió. krónur | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 151,7 | 199,6 |
| Starvsvenjing | 12,6 | 13,6 |
| Fiskavirkisskipanin | 24,4 | 20,8 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 3,4 | 4,3 |
| Førleikamenning | 4,2 | 6,0 |
| | **196,4** | **244,3** |

## Lønir og kostnaðir

Við árslok í 2013 vóru 31 fólk í føstum starvi hjá ALS. Eitt ár frammanundan var talið 29.

Umframt tey 31 fólkini í føstum starvi vóru eisini trý fólk í læru hjá ALS, og 11 fólk hava verið í starvi í styttri tíðarskeið í 2013.

**ALS-gjald og samlað inngjøld 1992 - 2013**






Samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar vóru 14,95 mió. krónur í 2013 í mun til 12,93 mió. krónur í 2012.

Frá 1. januar 2013 at rokna vórðu roknskaparligu handfaringarnar av íløgum broyttar soleiðis, at mest sum øll keyp, sum árini frammundan hava verið handfarin sum íløgur, tvs. hava verið ognarførd og avskrivað yvir fleiri ár, nú verða útreiðsluførd alt fyri eitt umvegis raksturin. Tað hevur við sær, at samanberingin við undanfarin ár skal gerast við hóskandi fyrivarni, tí summar av rakstrarútreiðslunum aftaná broytingina kunnu vera hægri, enn um broytingin ikki hevði verið gjørd.

Tað hevur hinvegin eisini við sær, at avskrivingarnar verða tað lægri, tí minni verður at avskriva.

Hóast hesar broytingarnar, so hevur miðvísa fokusið á at tálma rakstrarkostnaðunum, og í so stóran mun sum til ber at fáa meira fyri minni, gjørt, at tað kostaði slakar 100 tús. krónur minni at reka ALS í 2013 í mun til 2012. Verður hædd tikin fyri broyttum roknskaparpraksis, so var sparingin á leið eina hálva mió. krónur – svarandi til meir enn 6%.

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir í 2013 vóru 7,7 mió. krónur í mun til 7,8 mió. krónur í 2012.

## Ársúrslit og eginogn

Tekniska úrslitið, sum er munurin millum inntøkur og útreiðslur til arbeiðstøk, var eitt hall á 12,9 mió. krónur. Tað er 50,9 mió. krónur betri enn í 2012, tá tekniska úrslitið var eitt hall á 63,7 mió. krónur.

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt hall á 35,6 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt hall á 84,5 mió. krónur í 2012.

Av tí at ognirnar minka í virði, og at tað tí er minni eftir at avskriva, og tí at nýggjar íløgur verða útreiðsluførdar alt fyri eitt um raksturin, vóru avskrivingarnar væl minni í 2013 samanborið við 2012. Í 2013 vóru avskrivingarnar 2,9 mió. krónur, meðan tær í 2012 vóru 5,0 mió. krónur. Um tvey ár ella so verður tað bara bygningurin, sum verður av-

**Samlað útgjøld 1992 - 2013**



skrivaður, og verða árligu avskrivingarnar tá einar 200-300 tús. krónur.

Inntøkurnar frá fíggjarognunum vóru 11,8 mió. krónur í 2013. Tað er 3,2 mió. krónur minni enn í 2012.

Ársúrslitið gjørdist eitt hall á 28,5 mió. krónur. Talan var sostatt um eina munandi betring annað árið á rað. Í mun til 2012, tá hallið var 77,1 mió. krónur, er talan um eina betring á 48,6 mió. krónur.

Virðið á virðisbrøvunum skiftir alt eftir, hvussu marknaðurin broytist, og eisini eftir hvussu úrslitið hjá ALS er. Hevur skipanin hall, verða virðisbrøv seld at fíggja hallið, og hevur skipanin avlop, verða íløgur gjørdar í virðisbrøv fyri at betra um trygdina av tøka peninginum og fyri at tryggja skipanini betri inntøkur frá fíggjarognunum.

Við árslok í 2012 vóru samlaðu íløgurnar í virðisbrøv 295,7 mió. krónur. Hallið í 2013 hevði við sær, at virðisbrævaognirnar minkaðu við 25 mió. krónum niður í 270,7 mió. krónur við árslok í 2013.

Við ársbyrjan í 2013 var eginognin 335,4 mió. krónur, og við árslok eitt ár seinni var eginognin minkað niður á 306,9 mió. krónur.

Við einum óbroyttum halli, sum tað, sum var í 2013, heldur eginognin í eini 10-12 ár afturat.

## Útlit fyri 2014

Útlitini fyri 2014 tykjast betri, enn tey vóru fyri einum ári síðani.

Arbeiðsloysið, sum var minkandi í 2013, hevur hildið á at minka eftir ársskiftið, og í summum yrkisgreinum, serliga innan byggivinnuna og aðrar handverkaravinnur, er tørvurin á fólki so mikið stórur, at tað ikki altíð ber til at finna skikkað fólk við neyðugum førleikum í Føroyum. Tí verður tað nú lættari at fáa ávísa útlendska arbeiðsmegi til Føroyar at arbeiða.

Nógvar stórar byggiverkætlanir halda fram í 2014, og aðrar fara í gongd.

### Ársúrslit 1992 - 2013



Alivinnan hevur havt fleiri góð ár á rað, og 2014 tykist ikki verða eitt undantak í so máta.

Kvoturnar á uppisjóvarfiski eru metstórar, og nú semja er fingin við hini strandalondini, og uppisjóvarskipini aftur kunnu fiska í eitt nú norskum sjógvi, eru útlitini hjá tí partinum av flotanum góð.

Eisini hjá skipunum, sum fiska botnfisk undir Føroyum, tykjast glottar at hómast. Tekin eru í 2014 um, at meiri er at fáa av botnfiski, og partar av hesum flotanum hava eisini konsoliderað soleiðis, at minni stál er til fleiri stertar.

Yvirhøvur tykjast útlitini hampilig. Hóast landið framvegis hevur hall á fíggjarlógini, og at tað sannlíkt skulu fremjast sparingar innan tað almenna, so eru vónirnar, at arbeiðsloysið fer at minka enn meiri í 2014. Saman við neyðugum tillagingum av skipanini fer tað at tryggja framtíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá skipanini

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2013 til 31. desember 2013 vísir eitt hall á 28.520.331 krónur móti einum halli á 77.095.959 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2012 til 31. desember 2012.

Leiðslan metir ikki úrslitið vera nøktandi, tí tá arbeiðsloysið er so lágt, sum tað hevur verið, eigur skipanin at hava avlop. Tí er neyðugt at gera broytingar í skipanini, so javnvág fæst í raksturin.

Tøkur peningur og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini eru í 2013 minkað við 25,8 mió. krónum úr 304,3 mió. krónum niður í 278,5 mió. krónur.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá roknskaparloki til í dag er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## Eginogn 1992 - 2013



# Rakstrarroknskapur

| | | 2013<br>DKK | 2012<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **Inngjøld** | **183.488.559** | **180.540** |
| | Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | -196.357.236 | -244.285 |
| | Aðrir kostnaðir | -7.735.953 | -7.817 |
| | **Bruttovinningur** | **-20.604.630** | **-71.562** |
| 1 | Starvsfólkaútreiðslur | -14.950.269 | -12.934 |
| | **Úrslit áðrenn av- og niðurskriving** | **-35.554.899** | **-84.496** |
| | Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | -2.881.327 | -4.980 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-38.436.226** | **-89.476** |
| | Fíggjarpostar | 11.774.908 | 15.039 |
| | **Úrslit áðrenn skatt og avgjøld** | **-26.661.318** | **-74.437** |
| | Skattur og avgjøld | -1.859.013 | -2.659 |
| | **Úrslit** | **-28.520.331** | **-77.096** |

**Býti av úrsliti**

| | | |
|---|---|---|
| Skotið verður upp at býta úrslitið soleiðis: | | |
| At flyta til næsta ár | -28.520.331 | -77.096 |
| **Tilsamans** | **-28.520.331** | **-77.096** |



# Fíggjarstøða

## AKTIV

| | | 31.12.13<br>DKK | 31.12.12<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | Grundøki og bygningar | 27.245.691 | 27.473 |
| 2 | Tøkniogn og maskinur | 1.642.095 | 3.709 |
| 2 | Rakstrargøgn og innbúgv | 337.558 | 924 |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | **29.225.344** | **32.106** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **29.225.344** | **32.106** |
| | Skuldarar | 8.983.815 | 8.977 |
| | Onnur áogn | 319.602 | 64 |
| | Tíðaravmarkingar | 264.381 | 7 |
| | **Áogn tilsamans** | **9.567.798** | **9.048** |
| | Virðisbrøv | 270.739.366 | 295.657 |
| | **Virðisbrøv og kapitalpartar tilsamans** | **270.739.366** | **295.657** |
| | **Tøkur peningur** | **7.795.681** | **8.672** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **288.102.845** | **313.377** |
| | **Aktiv tilsamans** | **317.328.189** | **345.483** |

## PASSIV

| | | 31.12.13<br>DKK | 31.12.12<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 3 | Stovnsfæ | 93.840.006 | 93.840 |
| 3 | Flutt úrslit | 213.041.402 | 241.562 |
| | **Eginogn tilsamans** | **306.881.408** | **335.402** |
| | Vøru- og tænastuskuld | 1.464.456 | 1.924 |
| | Onnur skuld | 8.982.325 | 8.157 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **10.446.781** | **10.081** |
| | **Skuld tilsamans** | **10.446.781** | **10.081** |
| | **Passiv tilsamans** | **317.328.189** | **345.483** |

4 Veðsetingar og aðrar skyldur

# Pengastreymsuppgerð

| | 2013<br>DKK | 2012<br>t.DKK |
|---|---:|---:|
| **Ársúrslit** | **-28.520.331** | **-77.096** |
| Avskrivingar | 2.881.327 | 4.981 |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | |
| Áogn | -518.713 | -2.583 |
| Ognarar | -459.725 | -1.400 |
| Skyldugur arbeiðsloysisstuðul | 824.649 | -11.154 |
| **Pengastreymar frá rakstrinum** | **-25.792.793** | **-87.252** |
| Keyp av materiellari støðisogn | 0 | -2.532 |
| **Pengastreymar frá íløgum** | **0** | **-2.532** |
| **Samlaðir pengastreymar í árinum** | **-25.792.793** | **-89.784** |
| Gjaldføri við ársbyrjan | 304.327.840 | 394.112 |
| **Gjaldføri við árslok** | **278.535.047** | **304.328** |
| Gjaldføri við árslok verður útgreinað soleiðis: | | |
| Tøkur peningur | 7.795.681 | 8.671 |
| Virðisbrøv | 270.739.366 | 295.657 |
| **Tilsamans** | **278.535.047** | **304.328** |



# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvar við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í miðalstóra C flokkinum, við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl fyri undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og máting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt sum tær verða forvunnar, herundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herav av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma skipanini til góðar, og virðið av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntaðan miss og váðar, ið vísa seg áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## GJALDOYRA OG TRYGDARDISPOSITIÓNIR

Ársfrásøgnin er gjørd í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í árinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur eftir kursinum við roknskaparlok, tó undantikið kurstryggjaðar upphæddir, sum verða upptiknar til tann tryggjaða kursin. Staðfestur og óstaðfestur kursvinningur ella -tap, verður tikin við í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Virði á støðisogn, sum er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður umroknað til kursin tann dagin, ognin er keypt.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Inntøkur

Gjøld frá løntakarum og arbeiðsgevarum v.m. verða inntøkuførd í tí roknskaparári, sum lønin, ALS gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inntøkur frá sjálvstøðugt vinnurekandi verða inntøkuførdar einaferð árliga, og tryggingartakarin hevur yvirtikið skylduna fyri árslok.

### Útgjøld

Útgjøldini eru tíðargreinað soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men sum hoyra heima í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni ultimo í roknskaparárinum.

### Aðrir kostnaðir

Her er talan um kostnað í samband við útbreiðslu (distributión), marknaðarføring, umsiting, hølir og tap av ágóða.

### Avskrivingar

Avskriving av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at tað fer fram ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Felagið hevur brúkt niðanfyri standandi brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---:|---:|
| Bygningar | 50 ár | 32% |
| Tøkniogn og maskinur | 3 ár | 0% |
| Rakstrargøgn og innbúgv | 3-10 ár | 0% |

Grundøki verða ikki avskrivað.

### Fíggjarpostar

Undir fíggjarpostar koma rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og -tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur og rentuendurgjald av skatti. Fíggjarinntøkur og fíggjarligir kostnaðir verða upptiknir við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

### Skattur og avgjøld

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

Posturin umfatar meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum.

## FÍGGJARSTØÐA

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin í fíggjarstøðuni til kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar ella til endurvinningarvirði, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Vinningur ella tap við avhending av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum sølurísin frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virðið, tá støðisognin verður seld. Vinningur ella tap verður upptikið í rakstrinum undir avskrivingar.

### Áogn

Áogn verður virðisásett við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, umfata goldnar útreiðslur, sum viðvíkja næsta roknskaparári.

### Onnur virðisbrøv og kapitalpartar

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, sum eru upptiknir í ogn í umferð, umfata børsskrásett lánsbrøv og partabrøv, sum verða upptikin til dagsvirði seinasta roknskapardag. Virðisbrøv, sum ikki eru børsskrásett, verða upptikin til eitt søluvirði, sum er grundað á eitt roknað kapitalvirði.

### Skuld

Stuttfreistað skuld verður tikin við til tann kostprís, sum hon er niðurgoldin til. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virðið.

## PENGASTREYMSUPPGERÐ

Pengastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir pengastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í pengastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Pengastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar og broyting í rakstrarkapitali.

Pengastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av materiellari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevnda posti.

Tøkur peningur við ársbyrjan og -enda er samansettur av tøkum peningi og virðisbrøvum.



# Notur

## 1. Starvsfólkaútreiðslur

| | 2013 DKK | 2012 t.DKK |
|---|---|---|
| Lønir | 12.945.356 | 11.209 |
| Eftirløn | 1.366.463 | 1.168 |
| Almenn gjøld | 501.595 | 433 |
| Aðrar starvsfólkaútreiðslur | 136.855 | 124 |
| Tilsamans | 14.950.269 | 12.934 |
| Harav samsýning til stjórn og stýrið | 2.065.200 | 1.190 |
| Miðaltal av starvsfólkum | 32 | 29 |

## 2. Materiell støðisogn

| Upphædd í DKK | Grundøki og bygningar | Tøkniogn og maskinur | Rakstrargøgn innbúgv |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði pr. 31.12.12 | 28.672.622 | 17.392.983 | 3.309.563 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| Útveganarvirði pr. 31.12.13 | 28.672.622 | 17.392.983 | 3.309.563 |
| Av- og niðurskrivingar pr. 31.12.12 | 1.199.249 | 13.683.888 | 2.385.360 |
| Av- og niðurskrivingar í árinum | 227.682 | 2.067.000 | 586.645 |
| Av- og niðurskrivingar pr. 31.12.13 | 1.426.931 | 15.750.888 | 2.972.005 |
| Roknskaparligt virði pr. 31.12.13 | 27.245.691 | 1.642.095 | 337.558 |

## 3. Eginogn

| Upphædd í DKK | Stovnsfæ | Flutt úrslit |
|---|---|---|
| *Eginognaruppgerð 01.01.12 - 31.12.12* | | |
| Salda pr. 31.12.11 | 93.840.006 | 318.657.692 |
| Flutt úrslit | 0 | -77.095.959 |
| Salda pr. 31.12.12 | 93.840.006 | 241.561.733 |
| *Eginognaruppgerð 01.01.13 - 31.12.13* | | |
| Salda pr. 31.12.12 | 93.840.006 | 241.561.733 |
| Flutt úrslit | 0 | -28.520.331 |
| Salda pr. 31.12.13 | 93.840.006 | 213.041.402 |

| Býti av stovnsfæ: | 2013 DKK |
|---|---|
| Føroya Landsstýri | 20.000.000 |
| Arbeiðsgevarar | 29.775.400 |
| Løntakarar | 30.139.356 |
| Frítíðargrunnurin | 13.925.250 |
| Salda pr. 31.12.13 | 93.840.006 |

## 4. Veðsetingar og aðrar skyldur

Ognirnar hjá skipanini eru ikki veðsettar.
Tað áhvílur ikki skipanini aðrar møguligar skyldir so sum ábyrgdir, vekslar v.m.

Sett upp: Heiði Gásadal · Print: Føroya Prent · Myndir: Birita Hansen

Arbeiðsloysisskipanin · Postsmoga 3022 · FO-110 Tórshavn
Tel 349550 · Fax 349551 · als@als.fo · www.als.fo